## Hótta Esvagt við verkfalli

Felagið hjá donskum skipsyvirmonnum, Søfartens Ledere, hóttir nú við at lata teir limirnar, sum sigla við skipunum hjá Esvagt, fara í verkfall. Partarnir hava tingast um nýggjan sáttmála í seinastuni, men sambært fakfelagnum hevur tað ikki borið til at finna semju um løn og onnur viðurskifti. Tí hevur felagið nú boðað Esvagt frá, at fæst ikki semja um sáttmálan, fara limirnir hjá Søfartens Ledere í verkfall á midnátt tann 19. november.




## Politikarar misbrúka lóg

Í Grønlandi hevur hvast orðaskifti tikið seg upp, eftir at danska sjónvarpið DR hevur gjørt eina sending um, hvussu fyrrverandi politikarar og embætismenn misbrúka eina lóg til at ogna sær hús í Nuuk fyri lítið og lætt. Í sendingini kemur millum annað fram, at fyrrverandi landsstýrismaðurin Johan Lund Olsen fekk eini hús í Nuuk fyri 680.000 krónur, sjálvt um tey vórðu virðismett til tvær mió. krónur. Sendingin er í DR TV mikukvøldið.

# Havnarbørn við mold undir neglini



*12 børn og fýra vaksin vóru við á vóru við á »arbeiðsferðini« í Vágum og tóku epli upp*

UPPLÆRING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Fyri tveimum vikum síðani vóru nøkur børn úr dagstovninum, Vípuni, á Hálsi í Havn og Løgmannabreyt í Hoyvík vesturi í Sandavági og tóku síni egnu epli upp, sum tey sjálvu settu niður í mei.

Eins og børnini vóru eplini rættiliga smá, men hetta týddi ikki so nógv fyri børnini, sum hugnaðu sær óført við arbeiðinum.

Tað er ein av pedagogunum, sum eigur teigin, har veltan liggur. Hetta er vorðin ein siðvenja, ið hevur til endamáls at læra børnini nakað um føroyska siðin at »seta niður epli«, sum dagstovnarnir byrjaði við fyri 17 árum síðani.

Á hvørjum ári verða setepli sett við til næsta árið.



*Tveir dagstovnar í Havn og í Hoyvík hava í 17 ár havt egna eplaveltu í Sandavági*



*Endamálið við at velta er at læra børnini um føroysku siðvenjuna »at seta niður epli«*

## Minnisvarði fyri Viderø presti

**Komandi sunnudagin verður minnisvarði avdúkaður í Skálavík fyri Kristian Osvald Viderø, presti og rithøvunda**

AVDÚKING
*Kári Mikkelsen*



*Viderø, sum doyði í 1991, var ættaður úr Skálavík. Heimbygdin heiðrar nú bygdamanninum við einum minnisvarða*

Kendi presturin, rithøvundurin og bíbliutýðarin, Kristian Osvald Viderø, vanliga nevndur Viderø, verður nú heiðraður í heimbygdini Skálavík.

Sunnudagin 28. oktober verður minnisvarði, ið er gjørdur á Grótvirkinum í Skálavík, avdúkaður við Skálavíkar kirkju. Byrjað verður við guðstænastu kl. 12, og síðani verður hátíðarhald, har sonurin Torbjørn Viderø avdúkar minnisvarðan.

Viderø var føddur í Skálavík 1906 og andaðist í Keypmannahavn 1991. Eftir konfirmatiónina var hann til skips nøkur ár, áðrenn hann í 1926 fór á Føroya Fólkaháskúla. Í 1930 tók hann málsligt studentsprógv í Keypmannahavn. Gudfrøðiprógv fekk hann frá lærda háskúlanum í Keypmannahavn í 1941. Hann var prestur í Hvalvík, Havn, Viðareiði og síðst í Hvalba. Harumframt ferðaðist hann dúgliga suðurog eystureftir alla ævi sína. Sum bíbliutýðari var hann maðurin, ið megnaði at lyfta arvin eftir Jákup Dahl próst. Týðing hansara av Gamla Testamenti var liðug í 1952 og kom út í síni heild í Bíbliuni 1962.

Fyrsta bók hansara var »Ferð mín til Jorsala«, sum kom út í 1957.

Eftir at hann fór frá sum prestur eru nógvar bøkur komnar aftrat. Teirra millum tær nógv lisnu saga-bøkurnar og ferðafrásagnir.

Tá »Ferð mín til Jorsala« varð givin út aftur í 1984, tók Sverri Egholm, landsbókavørður til, at hetta so avgjørt var tann bók, hann metti hægst í føroyskum bókmentum. Eitt verk, sum ikki smæðist burtur ímillum bestu heimsbókmentir.

Eftir hátíðarhaldið verður alment borðhald á Keldu, har fleiri fara at hugleiða um bygdamannin, sum gjørdist prestur, bíbliutýðari og skald.